**Skúlastýrisfundur 8. mars 2021**

**Møtt vóru:** Marianna, Ann Mari, Marianna H, Rudi og Birgir

1. Ferðsluviðurskifitin
   - atlitið at bussteðgiplássi
   - ferðslan um morgunin
2. Játta til skúlan frá kommununi 2021
3. Verkætlan í samband við ábøtur á skúlagarð fyri 2021
4. Samstarv millum skúla, kommunu og brúkarar av høll.
   -ynski at fáa lýst hvussu vit kunnu fáa ein leist viðvíkjandi hesum til frama fyri bæði næmingar/brúkarar,skúla og kommunu (umsjón).
5. Móttøkuskipan av næmingum sum ikki hava føroysk foreldur (tilflytarar)

   - hvørja ætlanir hevur kommunan hesum viðvíkjandi sum stuðlar skúlanum í hesi móttøku, fremst av øllum barninum/næminginum og foreldur teirra.
6. Nýggj KT - skipan hjá Mentamálaráðnum- hvussu og nær verða brúkarar (foreldur, lærarar o. a. tikin við í tilgongdini
7. Kunning
8. Ymiskt

**Ad. 1**

Stutt lýsing av tí sum er gjørt í mun til ferðsluviðurskiftini á skúlanum í árunum framman undan.

Tosað bleiv um bussteðgi-pláss, bungur, ferðamátari o. s. fr.

Semja er um at gera eina lýsing av støðuni í mun til tryggleikan hjá skúlabørnunum og gera eitt uppskot til loysn, har skýlið verður flutt yvir á síðuna tað megin skúlin liggur.

Semja er um at Annfinn Brekkstein má kunnast um málið og taka tað upp heimi í kommununi.

Formaðurin í stýrinum setur seg í samband við Annfinn áðrenn komandi fund.

**Ad. 2**

Játtanin til skúlan frá kommununi bleiv løgd fram. Játtanin er áleið 4,5 mill, helmingurin fer til lønir hjá starvsfólkum.

Fíggjarliga hevur tað verið trongt tey seinastu árini, m.a. tí fíggjarviðurskiftini millum partarnar sum nýta bygningin ikki eru komin uppá pláss fyrr enn nú hetta fíggjarárið 2021.

Sum kunning bleiv vist á, at landið letur læraralønirnar og at hetta er eitt fíggjarrensl fyri seg sum fylgir skúlaárinum.

**Ad. 3**

Skúlin hevur fingið játtað 500.000 kr til at bøta um trygdina við spæliplássið uppi við grunddeildina.

Skúlin er farin inn í eitt samstarv við Articon sum er á staðnum, hesir hava við vælvild tikið á seg uppgávnuna nú teir eru á.

**Ad. 4**

Samstarvið um hølluna liggur í eini samstarvsavtalu millum skúla, frítíðarskúla og hallarumsiting, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt.

Samstarvið hevur verið trupult tí áhugamálini renna saman í samband  við nýtsluna úti á felags økinum. Ítróttarparturin kann illa liva við at atkomuviðurskiftini eru so vánalig og ynskja at hesi viðurskifti gerast betur og eru tey farin í samráð við kommununa um hetta.

Frítíðarskúlin hevur eisini sínar avbjóðingar í mun til møguleikar at brúka høllina.

Skúlin er skerdur í sínum felagsvirksemið til fundir o. a. í økinum. Miðøkið er merkt av gangi og nógvari ferðan aftur og fram, sum ávirkar virksemi hjá skúlanum so mikið, at ringt er at hava felagsvirksemi.

Upprunaliga, tá høllin var bygd, bleiv ein ætlan løgd um at gera ein dur inn í høllina so at ítróttarfólk kundi koma og fara tann vegin, men hetta er ein ætlan sum ikki

**Ad. 5**

Skúlin hevur í tveimum førum verið við til at søkja um ein móttøkuflokk.

Undirvísingarstýrið skal játta tímar til eina slíka verkætlan og hin parturin er at kommunan stuðlar upp undir við ráðgeving og hjálp til familjuna tað snýr seg um.

Henda ætlan er enn ikki førd út í lívið, tí ætlanin hevur ikki fingið  játtan.

Ístaðin hava vit 10 tímar  sum verða lisnir í skúlanum í skeiðum og eftir tørvi hjá teimum næmingum vit hava á skúlanum. Tað er tveir royndir lærarar ið taka sær av hesum skeiðum.

Avbjóðingin er í størri mun at tað verður í ov lítlan mun tikið sær av allari familjuni.

**Ad 6**

Hetta mál liggur langt út í framtíðini at talan er kanska um 2024 ella 2025

**Ad 7**

Arbeitt verður við at gera nýggjar upptøkureglur til 1. flokk

Væntandi verður bústaðurin raðfestur longri frammi í røðuni og forskúlin ikki gevur framíhjá rættindi

51 børn vóru á listanum til  komandi 1. fl.

Ætlanin er at loysa upp fyri felags tiltøkum aftur, Grækarismessuhald verður í vikuni í ymsu.

Skipað verður fyri øðrvísi døgum seinastu vikuna fyri páskafrítíðina.